# Tveitti skógv eftir forsetanum

Sudanska løgreglan tók í gjár ein mann, sum lat seg úr øðrum skónum og tveitti hann eftir landsins forseta, Omar al-Beshir. Reuters-tíðindastovan skrivar, at maðurin tveitti skógvin eftir Omar al-Bashir beint uttan fyri móttøkuhúsini hjá forsetanum, men hann rakti ikki. Tað er ikki greitt, hví maðurin tveitti skógvin eftir forsetanum. Omar al-Bashir hevur verið forseti í Sudan síðani 1989. Hann hevur skrivað út val, sum verður í apríl. Tað er fyrsta valið í Sudan í 24 ár.



# Ericsson sigur upp

Svenska telefyritøkan Ericsson kunngjørdi í gjár, at 1.500 av hennara starvsfólkum verða uppsøgd. Uppsagnirnar eru ein avleiðing av, at rakstraravlopið er minkað í stórum. Svenska tíðindastovan TT skrivar, at í oktober-ársfjórðingi í fjør hevði Ericsson 229 milliónir krónur í avlopi samanborið við 2,8 milliardir krónur í sama ársfjórðingi í 2008. Ein orsøk var sambært leiðsluni, at felagið hevði stórar útreiðslur av bygnaðarbroytingum, sum kostaðu meiri enn átta milliardir krónur. 5.000 fólk mistu arbeiði hjá Ericsson í fjør.

# Rigga til fyrsta gággutúrin



*Svørtu rúsurnar síggja ikki út av nógvum, men hetta eru tær sum skulu fylla ta stóru lastina við gággum í framtíðini*

**Teir hava ligið við bryggju í eini tvey ár. Men nú verður alt gjørt fyri at Varðborg skal kunna fara aftur til fiskiskap um ikki so langa tíð**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Oyri:** Tað ræður um at halda tunguni mitt í munninum her umborð á Varðborg.

Allastaðni kring um í skipinum eru menn til arbeiðis. Og tað er ikki bert føroyskt mál, ið tosað verður umborð.

Á brúnni er skiparin Hjalmar Knudsen av Skála upptikin við sínum arbeiði. Ein slíkan dag, nú tað styttist til leggjast skal frá landi aftur, er altíð nóg mikið at takast við og hugsa um.

Hann hyggur niður av brúnni. Hann eygleiðir ein mann, sum millum boyur, rúsur og annað, er í holtur við sítt arbeiði á ovasta dekkinum. Og fór hann niður á verksmiðjuna ella í maskinrúmið, hevði hann sæð menn sum ídnir gera arbeiðið sítt.

Líkt er til, at teir allir eru sinnaðir at gera arbeiðið sítt bæði skjótt og væl, soleiðis at teirra partur ikki skal liggja eftir.

Her verður arbeitt bæði við flutningsbondini, frystilastina, maskinuna, á brúnni, á verksmiðjuni og aðrastaðni umborð.

## Ymisk mál

Tungumálini umborð á bátinum eru ein søga fyri seg. Hóast mong mál verða tosað her, er ikki líkt til at tað nervar liðugtgerðina av Varðborg tað minsta sindrið.

Umboðini fyri tíðindatænastuna tosaðu sjálvandi føroyskt við Skálamannin. Men tá komið var niður á verksmiðjuna var neyðugt at tosa enskt við handverkararnar har. Og teir tosaðu aftur sínámillum á einum máli úr eystara parti av Europa.

Aðrastaðni umborð stríddust nakrir mans av Filipsoyggjunum við sítt arbeiði. Teir hava sjálvandi sítt móðurmál at samskifta við. Men skal ein kunna tosa við allar menninar samstundis, er helst frægast at tosa enskt.

Hinvegin skilst, at skiparin sjálvur er rættiliga væl fyri málsliga at tosa við fleiri av monnunum umborð.

## Góðar vónir

Staðfestast kann, at Varðborg hevur ligið við bryggju í eini tvey ár.

Tað kann tykjast long tíð fyri eitt skip og eitt reiðarí, at eitt skip liggur bundið við bryggju í so langa tíð.